**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# 2 føst størv til stuðulstoymið

## 2 føst størv til stuðulstoymið hjá Stuðulsskipanini fyri vaksin í Suðurstreymoy.

Stuðulsskipanin fyri vaksin hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið.

Stuðulstoymið er ein tvørfakligur starvsfólkabólkur við 2 pedagogum, 1 sjúkrarøktarfrøðingi og 1 heilsuatstøðingi.

Málbólkurin hjá stuðulstoyminum er í høvuðsheitinum heimabúgvandi fólk millum 18 og 66 ár, ið hava munandi skerdan sálarligan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá stuðulstoyminum fevnir um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum.
- At bøta um møguleikan hjá brúkaranum at skapa eitt trygdarnet.
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, ið brúkarin ynskir ella hevur tørv á.
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, so sum matgerð, reingerð, klædnavask, handilsørindum, peningaviðurskiftum og øðrum, samstundis sum hædd verður tikin fyri, hvat tann einstaki brúkarin megnar.
- At vegleiða brúkaran í samstarvinum við t.d. Almannastovuna, Økispsykiatriina, Psykiatriska depilin og aðrar myndugleikar.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleikan at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kanst átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Ert stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyir lívinum frá honum.
- Hevur eina positiva menniskjafatan.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Er opin og virkisfýsin.
- Kanst handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.
- Tú hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan psykiatriska økið.

**Stuðulsskipanin fyri vaksin kann bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervisión

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um 2 føst størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um størvini eru at fáa hjá sosialráðgeva Odu M. Jóhansdóttir og leiðaranum Regin Johansen, tlf. 354020.

Størvini verða sett 01.02.2005 ella skjótast aftaná.

Umsóknarfreistin er sett til fríggjadagin 31.12.2004 og umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
att.: Regin Johansen
Løkjatún 1
160 Argir

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 570,** P/F Teymavirkið, 620 Runavík.

**Viðtøkur broyttar:** 16.11.2004.
**Nýggj hjánøvn**: P/F Glæman (P/F Teymavirkið) og P/F Gávan (P/F Teymavirkið)

Skráseting Føroya tann 13. desember 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3775,** Sp/f Gunnvá, 460 Norðskáli.

**Viðtøkur broyttar**: 28.10.2004.
**Nevnd**:
Farin úr nevndini: Ási Potts, 460 Norðskáli (formaður), Snorri Einarsonur Vang, 460 Norðskáli og Jan Nattestad Jacobsen, 460 Norðskáli.
**Tekningarreglur**: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.

Skráseting Føroya
tann 13. desember 2004

Kristin Balle

---

i Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3876**
**Navn**: Sp/f Magnet
**Adressa**: Yviri við Strond 87, 100 Tórshavn
**Kommuna**: Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato**: 10.12.2004
**Viðtøkudato**: 10.12.2004
**Kapitalur**: Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur**: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari**: Sóleyð Maibritt Hofgaard, Yviri við Strond 87, 100 Tórshavn
**Stjórn**: Sóleyð Maibritt Hofgaard, Yviri við Strond 87, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur**: Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari**: Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Broncksgøta 16, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár**: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár**: 10.12.2004 - 31.12.2005
**Endamál**: Endamál felagsins er at fáast við ráðgeving, projektleiðslu, sølu og annað virksemi í sambandi við veitingar og loysnir innan dátusamskifti og kunningartøkni, gera íløgur og eiga partabrøv í øðrum feløgum og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 15. desember 2004

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 1792,** Sp/f Jasa, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 08.11.2004.
**Endamál**: Endamál felagsins er at reka fastogn, fíggjaríløgur, handil, umboðan og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. desember 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 939,** Sp/f Rosendal, 490 Strendur.
**Viðtøkur broyttar:** 09.12.2002.
**Nýtt navn:** Sp/f 9-12-2004

Skráseting Føroya
tann 15. desember 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2142,** P/F Fiskamarknaður Føroya, 650 Toftir.

**Viðtøkur broyttar:** 01.12.2002.
**Nýtt navn**: P/F Landingarmiðstøð Føroya
**Strikan av hjánavni:** P/F Faroe Fishmarket
**Nýggj hjánøvn**: P/F Landingarmiðstøðin á Toftum (P/F Landingarmiðstøð Føroya) og P/F Landingarmiðstøðin í Klaksvík (P/F Landingarmiðstøð Føroya)
**Nevnd**:
Farin úr nevndini: Jógvan Norðbú, Kálvagerði 2, 100 Tórshavn og Agnar Jensen, Heinagøta 11, 100 Tórshavn. Innkomin í nevndina: Heri Hansen, 650 Toftir (starvsfólkavaldur), (tiltakslimur:Jan Joensen, 650 Toftir), Kristian F. Olsen, á Brekku 54, 700 Klaksvík (starvsfólkavaldur), (tiltakslimur: Pauli Poulsen, 494 Innan Glyvur) og Rúni Lamhauge, 640 Rituvík (starvsfólkavaldur), (tiltakslimur: Jógvan Simonsen, 700 Klaksvík).

Skráseting Føroya
tann 14. desember 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3875**
**Navn**: Sp/f 1-12-2004
**Adressa**: 480 Skáli
**Kommuna**: Runavíkar Kommuna
**Stovningardato**: 01.12.2004
**Viðtøkudato**: 01.12.2004
**Kapitalur**: Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur**: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar**: Sp/f PE, 100 Tórshavn (Sp/f 3183) og Sp/f PW, 512 Norðragøta (Sp/f 2827)
**Stjórn**: Petur Eirik Djurhuus, Tjarnarlág 39, 100 Tórshavn og Hans Jørgen Djurhuus, Tjarnarlág 39, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur**: Felagið verður bundið við undirskrift av stjórunum hvør sær.
**Grannskoðari**: Sp/f Eyðfinnur Guðjónsson, Tórgarðsgøta 13, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár**: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár**: 01.12.2004 - 31.12.2005
**Endamál**: Endamál felagsins er at reka handil o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 10. desember 2004

Kristin Balle